# Bilur stolin í Fuglafirði – funnin aftur í Havn

*Løgreglan heldur seg hava góð spor at ganga eftir í royndini at finna tann seka*

Eyðun Klakstein

Leygarkvøldið var ein bilur stolin í Fuglafirði, og sunnudagin fann løgreglan bilin í Havn. Tá hevði bilurin fingið skaða.

Løgreglan í Runavík sigur, at leygarkvøldið var innbrot í ein matvøruhandil í Fuglafirðið, men einki varð stolið. Seinni var bilurin stolin, og løgreglan avvísir ikki, at samband er millum tilburðirnar.

Leygarkvøldið fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein bilur hevði rent á Tórshøll, men bilurin varð rýmdur á staðnum. Sunnudagin kom løgreglan fram á bilin, og talan var um tann bilin, sum var stolin í Fuglafirði leygarkvøldið.

Bilurin hevði fingið skaða, og løgreglan sigur, at hon hevur góð spor at ganga eftir í royndini at finna tann seka. Løgreglan í Runavík segði seg mánadagin vera komin so langt við málinum, at tað væntaði eina skjóta uppklåring og at finna tann seka.



*Viðingar og sløkkiliðið í Klaksvík hava fingið bilbukt við eldinum í sethúsunum á Viðareiði*

# Eldur í sethúsum á Viðareiði

Fríggjadagin varð sløkkiliðið í Klaksvík boðsent til Viðareiðis – annan dagin á rað.

Eldur varð komin í eini sethús, og tá sløkkiliðið kom á staðið var nógvur roykur, men eldurin var sløktur.

Køkurin fór illa, men restin av húsunum brendi ikki. Hinvegin var nakað av vatn- og roykskaða.

Sjúkrabilur fór eisini úr Klaksvík, men eingin fólkaskaði var av eldsbrunanum

**ek**



# Góða kera Súsanna

Eg minnist fyri bert fáum mánaðum síðan, tá ið tú spurdi meg, hvussu tú skuldi orða teg í tínum minningarorðið til tín kæra vin, sum fórst í bilvanlukku eins og tú, góðasta Súsanna. Mær tóktist so synd í tær, at tú skuldi missa vin á so ungum ári. Eg vildi ikki trú, at eg skuldi missa teg so stutt eftir, góðasta.

Vit hava verið so væl nú í 3 ár, meðan vit hava gingið í flokki saman og tann, ið mest av øllum hevði uppiborið eitt studentsprógv, var tú, góða, kera Súsanna. Tú vart altíð glað og altíð klár at hjálpa, tá ið ein ikki dugdi og vit hava so ótrúliga nógv at takka tær fyri, góðasta.

Eg takki tær fyri 3 góð vinaár og eg fari aldri at gloyma teg og eg veit, at vit ein dag síggjast aftur í himli.

**Rakul**

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo

# Tingmaður: Aftur til gomlu fólkaskúlalógina

*Jógvan á Lakjuni heldur, at einki samsvar er millum kostnaðin av nýggju fólkaskúlalógini og nyttuna, hon ger*



Eyðun Klakstein

Jógvan á Lakjuni, tingmaður fyri Fólkaflokkin, mælir nú landsstýrismanninum til at seta gomlu fólkaskúlalógina í gildi aftur.

– Løgtingið hevur samtykt eina nýggja fólkaskúlalóg uttan at hava hóming av, hvat hon kostar. Nýggja lógin fer eftir øllum at døma bert at kosta meira pengar, uttan at næmingarnir fáa meira burtur úr, sigur Jógvan á Lakjuni við Dagblaðið í gjár.

Tí heldur tingmaðurin hjá Fólkaflokkinum, at skilabest hevði verið at setta gomlu fólkaskúlalógina í gildi aftur.

Nýggja fólkaskúlalógin er kjarnin í stríðnum millum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið, sum hevur við sær, at verkfall er í fólkaskúlanum.

## Virkar ikki eftir ætlan

– Trupulleikin við nýggju fólkaskúlalógini er, at eingin veit, hvat hon gongur út uppá. Hetta er ein donsk lóg, sum vit hava umsett og gjørt til føroyska lóg, ístaðin fyri at laga eina nýggja lóg til føroysk viðurskifti, sigur Jógvan á Lakjuni við Dagblaðið.

Jógvan á Lakjuni heldur, at næmingarnir eru verri fyri, heldur enn at vera betri fyri undir nýggju fólkaskúlalógini, og tí heldur hann, at tað eigur at verða viðurkent, at lógin ikki virkar eftir ætlan, og at ein heilt nýggj viðgerð skal fara fram um fólkaskúlalógina.

– Ímeðan kunnu vit passandi seta gomlu fólkaskúlalógina í gildi aftur, sigur Jógvan á Lakjuni við Dagblaðið.



# Nýtt uppskot um kommunuskuldarspurningin

*Sp/f J.S.S. Consult við Jógvan Sundstein hevur í samstarvi við hollendskan banka latið føroysku kommununum uppskot um skipan av »Føroya Kommunukreditt«*



*Jógvan Sundstein hevur í samstarvi við hollenskan banka latið føroysku kommunumum uppskot um skipan av »føroya Realkreditt«*

Jákup Mørk

Sum liður í eini avklåring av skuldarspurninginum hjá føroysku kommunum, hevur Føroya løgmaður heitt á J. S. S. Consult um at arbeiða við eini møguligari umlegging føroysku kommunuskuldini.

Eftir hesum leisti, hevur J. S. S. Consult í longri tíð arbeitt saman við hollendska bankarisanum ABN-AMRO. Í februar 1999 varð eitt fullfíggjað uppskot lagt fyri Landsstýrið, samstundis sum umboð fyri bankan høvdu fund við føroyskar fíggjarstovnar og Føroya Kommuufelag. Kommunurnar í kommunusamskipanini sendu avboð til fundin.

Tá lóggávan á økinum og heimildirnar í hesum sambandi ikki vóru fullfíggjaðar um tað mundi, fekst eingin skipan í lag um hetta í 1999, men í januar mánaði í ár, heitti løgmaður aftur á J. S. S. Consult um at fáa eitt dagført uppskot.

Nýtt uppskot er tískil sent øllum kommunum í landinum, og skulu vit niðanfyri umrøða hetta í høvuðsheitum.

## Kommunalt kredittfelag

Sambært uppskotinum frá J.S.S. Consult, er ætlanin at seta á stovn Føroya Kommunukreditt, sum skal standa sum einasti lánveitari hjá føroysku kommununum.

Stovnsfæi í nýstovnaða felagnum skal eftir ætlan vera einar 80 mió.kr., sum skulu takast úr Kommunala Kreppulánsgrunninum. Kommunurnar skulu sostatt eiga part í felagnum í mun til tær upphæddir, sum eru goldnar grunninum.

Kommunala kredittfelagið skal síðani taka lán frá ABN-AMRO, uml. 1,3 mia. kr., sum so aftur verða læntar kommunum. Til tess at tryggja eitt framhaldandi lágt rentustøði á hesum láni, skal rentan tryggjast í ávíst áramál.

Rentan, sum kommunurnar so rinda til Kommunukredit, verður so nakað hægri enn rentan, sum Kommunukredit rindar ABN-AMRO, soleiðis at peningur er til rindan av umsiting og provisiónum. Um so er, at gjaldið til Kommunukreditt fær ov nógvan pening burtur úr hesum, verður hetta afturborið kommununum í kraft av, at tað verða tær, sum fáa ágóðan av einum møguligum yvirskoti.

Afturgjaldstíðin verður ætlandi 15 ár, og verða lánini veitt sum annuitetslán. Eins og við núverandi skipan, skal Kommunukredit hava transport í skattainntøkunum hjá kommununi, og hava kommunurnar framhaldandi møguleika at rinda eyka avdráttir.

## Samhaldsfesti

Tá Landsbankin fyri stuttum, saman við danska Uni-Bank, legði fram uppskot um eina samlaða umlegging av kommunuskuldini, fekk hetta uppskot heldur kaldliga móttøku frá stóru kommununum.

Ta ferðina førdu býráðsformenninir í bæði Klaksvík og Havn fram, at teir ikki kundu ganga við til, at kommunurnar fóru inn í eina solidariska skipan, har kommunurnar hefta fyri hvørjari aðrari.

Í uppskotinum frá J.S.S. Consult, verður júst samábyrgd nevnd sum ein partur av trygdargrundarlagnum hjá einum møguligum kommunalum kredittfelag.

Mett út frá hesum, tykjast sannlíkindini fyri, at ein slíkur stovnur verður settur á stovn, ikki serliga stór, men hetta verður so ein spurningur, sum einstøku kommunurnar skulu taka støðu til.

Í øllum førum tykist vera vist, at stendur tað upp til Løgmann, verður okkurt slag av solidariskari skipan gjøgnumførd. Tey bæði uppskotini frá ávíkavist Landsbankanum og J.S.S. Consult eru bæði gjørd eftir áheitan frá Løgmanni, og harumframt tykjast tey vera rættuliga lík hvørjum øðrum, so enn er seinasta orðið helst ikki sagt í hesum sambandi.

# Uppleggið almannakunngjørt í dag

*– Vit hava ikki tikið støðu til, hvønn dag uppleggið verður almannakunngjørt, men antin mánadagin ella týsdagin í komandi viku, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, við Internet Sosialin beint eftir middag leygardagin.*

Ólavur í Beiti

Tað kemur meiri og meiri fram í donsku fjølmiðlunum um samráðingarnar millum Føroyar og Danmark og sipað verður serliga til føroyska uppleggið, og hetta er helst ein av orsøkunum til, at landsstýrið nú hevur avgjørt at uppleggið verður almannakunngjørt.

Internet Sosialurin ringdi til løgmann beint eftir middag leygardagin. Løgmaður var tá staddur í Keypmannahavn, og váttaði hann fyri Internet-Sosialinum, at samráðingaruppleggið verður latið almenninginum til kunningar.

Sosialurin skilir, at samráðingaruppleggið verður almannakunngjørt eftir fundin í uttanlandsnevndini, sum verður í dag klokkan 10, um ikki annað fyriliggur tá.

# Føroyskur tónleikur tøkur úti í heimi

*Plátufelagið Tutl má nú endurprenta fleri fløgur, tí gongd er komin á handil á netinum, hóast heimiligi marknaðurin er mettaður. The Ochard er útbjóðari, ið selur víðari til 150 aðrar útbjóðarar. Brátt verður føroyskur tónleikur eisini tøkur sum MP3 fílar*

Dagfinn Olsen

Nógv hevur verið prátað um at koma út um landoddarnar við føroyskum tónleiki. Mong hava kanska ikki lagt so nógv í prátið og hava ikki hildið nakað ítøkiligt verið í hesum.

Men hol tykist vera komið á. Setir ein seg við telduna og trýstir seg inn á heimasíðuna www.theochard.com, so er hópur av føroyskum tónleiki til keyps.

The Ochard, sum liggur í New York, er sølufelag á netinum, ið eisini selur víðari til 150 aðrar útbjóðarar. Tutl hevur samband við The Ochard og Amazon.

Stuttligt er at leita millum allan møguligan tónleik úr øllum heiminum og finna føroyskan tónleik, ið Tutl hevur givið út.

## Ragnar nummar eitt

Hetta sølusamstarv hevur givið úrslit. Tutl má nú endurprenta fleiri útgávur, sum ikki selja so nógv her heima longur, tí heimligi marknaðurin er mettaður, men sum nú selja úti í heimi.

Tey, ið hava selt mest úti í heimi, eru Ragnar í Vík, sum hevur selt yvir 200 fløgur, Spælimenninir hava selt 200, Klaki 110 fløgur, Aria 120 fløgur, Plastnoist 100 og Gluggamynd 90 fløgur.

Tutl hevur síðani desember sent einar 1500 fløgur avstað. Fyrst fóru umleið 10 stk. av umelið 50 ymsum fløgum. Síðani hevur The Ochard bílagt, og hetta gera teir, tí fløgurnar eru eftirspurdar.

## MP3 og psykisk søla

Framtíðin kemur áðrenn vit vita av. Hetta má ásannast. Óvíst er, hvussu nógvir føroyingar kenna til MP3 fílar. Hetta er teldumál og hevur við ljóð og tónleik á telduni at gera.

Tað er nevniliga so, at fløgan, sum vit kenna hana, brátt tykist fara í søguna.

Brátt verður tað so, at ein kann fara inn á heimasíður ella handlar og seta sær saman sína egnu fløgu, sum ein síðani kann gjalda fyri. Tað, tey rópa fyri tann fysiska sølan minkar, meðan tað, ið verður rópt psykisk og digital søla byrjar at gera um seg. Og her er tað, at MP3 fílar koma inn í myndina.

Ein skal rætt og slætt hugsa sær eina sølubúð, á netinum ella á gøtuni, har ein setur sær saman eina fløgu, júst sum ein hevur hug. Tað kann vera Ragnar í Vík, Kári p, Sting og Grieg. Hvørt um annað.

Um fáar vikur verður tutltónleikur seldur víða um í heiminum sum MP3 fílar. Sostatt kann hesin tónleikur takast niður av netinum fyri ávíst gjald.

Framtíðin er komin til Føroya og føroyskur tónleikur er komin útum landoddarnar og er sjónligur hjá teimum stóru útbjóðarunum á netinum.

Hevur ein áhuga, so er at hyggja hjá Orchard og trýsta seg inn á www.theorchard.com




*Ragnar í Vík er milum teirra, ið er til sølu hjá stóra netútbjóðaranum The Ochard. Hópur av føroyskum tónleiki er til sølu her*